# Heilsumálaráðið

**Løgtingið**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 03/03/2020 |
| Mál nr.: | 20/00061-26 |
| Málsviðgjørt: | SD/IN/RM |
| Eftirkannað: | 6. februar 2020 |

**Løgtingsmál nr. 72/2019: Uppskot til løgtingslóg um at dagføra KT- skipanina hjá Apoteksverkinum**

**Uppskot til**

**Løgtingslóg**
**um**
**at dagføra KT- skipanina hjá Apoteksverkinum**

**§ 1.** Landsstýrismanninum verður heimilað at gera avtalur um at dagføra KT-skipanina hjá Apoteksverkinum.
*Stk. 2.* Útreiðslurnar til at dagføra KT-skipanina kunnu í mesta lagi verða 10 mió. kr.

**§ 2.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og fer úr gildi 31. desember 2023.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

KT-skipanin í Apoteksverkinum (hereftir Apoteksskipanin), er ein rakstrarskipan fyri allan raksturin á Apoteksverkinum, tað vil siga, øll apotekini og framleiðsluna.

Apoteksskipanin er ment til at vera ein samansett skipan, sum fevnir um keyp og sølu av heilivági og øðrum vørum, kann goymslustýra, avgreiða viðskiftafólk á apotekunum, útskriva skamtanartekstir, skipa skamtluting av heilivági og útrokna stuðul til heilivág frá Heilsutrygd. Harumframt fevnir Apoteksskipanin eisini um bókhald, fíggjarstýring og framleiðslu av heilivágshagtølum.

Apotekskipanin samskiftir talgilt við aðrar skipanir, eitt nú verða forskriftir sendar frá talgildu heilsuskipanini Cosmic til Apoteksskipanina, sum avgreiðir forskriftirnar og samskiftir við goymslurobott, soleiðis at heilvágurin verður fluttur úr robottinum og til avgreiðsluna.

Samskifti er við Landsfólkayvirlitið umvegis Heldina, soleiðis at dagførdar upplýsingar um borgarar altíð eru tøkar. Skamtlutaður heilivágur verður í dag pakkaður til umleið 1200 persónar, og Apoteksskipanin stýrir pakkingini samsvarandi forskriftunum frá Cosmic heilsuskipanini. Apoteksskipanin verður hýst hjá KT Landsins, og harvið verða allar upplýsingar goymdar í Føroyum í tryggum rakstrarumhvørvi.

Verandi KT-skipan gongur út í 2021 og er tískil ikki virkin eftir tað. Hetta merkir fyri Apoteksverkið, at longu nú skal farast undir eina verkætlan við at dagføra KT-rakstarskipanina.

Ein slík verkætlan tekur væntandi 18 mánaðir, og er kostnaðurin at dagføra skipanina mettur at verða 10 mió. kr.

Løgtingið hevur í fíggjarlógini fyri 2020 játtað 2 mió. kr. til verkætlanina, og ætlanin er at játta aðrar 4 mió. kr. í 2021. Apoteksverkið skal sjálvt innanfyri raksturin fíggja 2 mió. kr. í 2020 og 2 mió. kr. í 2021. Samanumtikið verður komið til 10 mió. kr. soleiðis, at apoteksraksturin fíggjar 4 mió. kr. og at 6 mió. kr. verða veittar í játtan til endamálið í løgtingsfíggjarlóg. Hetta hevur við sær, at tann fíggjarliga heimildin er fingin til vega, og við hesum uppskotinum er ætlanin at fáa ta materiellu heimildina, so farast kann undir verkætlanina.

### 1.1. Orsakir til uppskotið
Uppskotið er gjørt fyri at fáa heimild at fara undir verkætlanina at dagføra KT-skipanina hjá Apoteksverkinum.

### 1.2. Galdandi lóggáva
Við heimild í landsins játtanarskipan er sett í kunngerð, at tá talan er um størri KT-verkætlanir, so skulu hesar hava heimild í og fremjast sambært verklagslóg.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við lógaruppskotinum er at fáa heimild at fara undir at dagføra KT-skipanina, og at fáa heimild at brúka 10 mió. kr. til endamálið.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Grundað á, at núverandi apoteksskipan gongur út í 2021 og tískil ikki verður virkin eftir tað, er longu nú tørvur á at fara undir at dagføra verandi skipan. Apoteksskipanin stýrir, sum lýst omanfyri, øllum virkseminum á apotekinum, og er tað tískil alneyðugt, at skipanin verður

dagførd, áðrenn verandi skipan gongur út í 2021. Apoteksverkið metir, at henda dagføring fer at kosta uml. 10 mió. kr.

Sum ásett í § 7 í kunngerð nr. 84 frá 2011, skulu allar KT-verkætlanir yvir 5 mió. kr. hava heimild í og fremjast sambært verklagslóg.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**
Lógaruppskotið er gjørt í tøttum samstarvi við Apoteksverkið, og tá talan er um eina dagføring av verandi KT-skipan, verður mett, at tørvur ikki er á at senda lógaruppskotið til hoyringar hjá øðrum pørtum.

**Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum**

**2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Dagføringin av apoteksskipanini verður fíggjað á tann hátt, at fyri 2020 eru 2 mió. kr. játtaðar á fíggjarlógini, meðan Apoteksverkið sjálvt fíggjar 2 mió. kr. Í 2021 er ætlanin, at 4 mió. kr. skulu játtast á fíggjarlógini, og Apoteksverkið fíggjar sjálvt tær síðstu 2 mió. kr.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Uppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri vinnuna.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Ongir millumtjóðasáttmálar eru galdandi á økinum.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Uppskotið er ikki í ósamsvari við millumtjóðasáttmálar.

**2.9. Markaforðingar**
Uppskotið elvir ikki til marknaðarforðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Uppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Uppskotið hevur ikki ásetingar um skatt og avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur**
Uppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur**
Uppskotið gevur Apoteksverkinum heimild til at fara undir at dagføra apoteksskipanina fyri 10 mió. kr.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn**
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar**
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar, enn lýst omanfyri.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
Ætlanin er at geva Apoteksverkinum heimild til at fremja eina dagføring av verandi apoteksskipan. Dagføringin er mett at kosta 10 mió. kr. og sambært kunngerð, skulu størri KT-verkætlanir heimilast og fremjast sambært verklagslóg.

**Til § 2**
Gildiskoma.

Heilsumálaráðið, 3. mars 2020

**Kaj Leo Holm Johannesen**
landsstýrismaður

/ Turid Arge
aðalstjóri